## Bundesen og hinir

Hóast hann var burtur frá bólkinum eitt trý-ára skeið miðskeiðis í 80'unum, so er Michael Bundesen fyri tey flestu ímyndin av Shu-bi-dua. Í dag er Bundesen 60 ár, og hann er farin um tey 61, áðrenn SummarFestivalurin verður hildin, men sinnalagið er framvegis yngri enn hjá teimum flestu. Upprunliga byrjaði Bundesen at lesa til jurist, men eftir at hava verið í danska herinum í 1970, fekk hann starv hjá Danmarks Radio, og síðani hevur tað verið innan undirhaldsvinnuna, at hann hevur gjørt um seg.



## Spæla fríggjakvøld

Hóast skráin til ársins útgávu av SummarFestivalinum ikki er klár enn, so er longu greitt, at tað verður fríggjakvøldið á festivalinum, at Shu-bi-dua skal spæla. Kanska eisini upplagt, nú bólkurin mest av øllum má roknast sum danska svarið til Dynamitt, sum tey bæði seinnu árini hevur rocka Vágsbø. Enn eru onnur nøvn ikki komin á matarlepan, men frá fyrireikarunum verður sagt, at talan sjálvandi aftur verður um ein fjølbroytta skrá, har føroysk og útlendsk nøvn borga fyri eini fjølbroyttari skrá fyri alla familjuna.

# Fólkafest á Vágsbøi



*Fólkavognurin er eitt av heilt stóru hittunum hjá Shu-bi-dua. Eingin ivi er um, at sangurin um lítla stórseljaran verður ein av teimum, sum fær lív í fjøldina á Vágsbøi í august mánaði*

**Fyri fýra árum síðani hvarv pallshowið í mjørkanum yvir flogvøllinum. Á náttartíð høvdu Hodgson og Deluxe køvt mjørkan, men Bundesen og hinir shub'arnir settust aftur. Á SummarFestivalinum í ár skal Shu-bi-dua prógva fyri føroyingum, at teir framvegis eru ein tann besti og fólkakærasti bólkurin í kongaríkinum**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað mundi kennast sum eitt fríslt lot í øllum fullveldisstríðnum, sum var um hetta mundið. Danin var fanin í nógvum leikum, men fríggjakvøldið 5. november 1999 varð alt hetta gloymt eina løtu. Shu-bi-dua stóð á pallinum í Ítróttarhøllini á Hálsi, og ummælarin her í blaðnum hevði eitt ordans plettskot, tá yvirskriftin varð sett: »1900 føroyingar í kór: Danmark er et deeeejligt land. Shu-bi duga«.

Tí vóru vónirnar eisini stórar, tá Shu-bi-duga skuldi á Vágsbø at undirhalda festivalgestunum í august mánaði í 2006. Veðurgudarnir argaðu tó frá síni ringastu síðu. Mjørkin lá tjúkkur á flogvøllinum, og tí mátti flogfarið við donsku tónleikarunum venda aftur til Kastrup. Á kvøldið varð roynt aftur, men tá gjørdi búkilska um seg, og boðini til festivalgestirnar vórðu tí, at einki shu-bi-dua kom á pall hetta kvøldið.

Talan gjørdist kosrtini um eitt tað besta festivalkvøldið í søguni hjá festivalinum. Eitt kvøld, har føroysku bólkarnir loftaðu fjøldini, og har Roger Hodgson og Johnny Deluxe spældu til morgunball á Vágsbøi, tá flogfar teirra loksins hevði sett seg. Men tað er nú ein heilt onnur søga.

### Skal vera stuttligt

Konsertin í 1999 prógvaði helst, at Shu-bi-dua er eins stórur her á landi, sum hann hevur verið tað í Danmark tey seinastu 37 árini. Tey 1900 atgongumerkini vórðu mest sum skrødd burtur í forsølu, og bara tað í sjálvum sær er jú eisini nakað, sum fullkomliga óvanligt her á landi.

Áhoyraratalið á Vágsbøi tann 6. august í ár verður helst nakað væl hægri enn tey 1.900, sum vóru á hálsi fyri góðum 10 árum síðani. SummarFestivalurin hevur frá byrjan ment seg til at verða størsta tónleikatiltakið her á landi, og í fjør vóru á leið 10.000 fólk savnað á Vágsbøi.

Men hetta er neyvan nakað, sum fær shubbarnar at rista í brókunum. Í samfull 37 ár hevur Shu-bi-dua prógvaði, at teir fram um øll onnur duga at undirhalda. Hóast árini eru vorðin nakað í tali, so er álmannakkin fult bókaður alla summarhálvuna, og uttan iva kundu teir spælt enn meira. Men støðugt hava teir hildið fast um, at ein partur av uppskriftini eisini er, at teir duga at halda frí frá tónleikinum helmingin av árinum.

– Vit hava sangirnar, sum fólkið kennir og kann syngja við til. Vit eru í stóran mun ein syngi-við-bólkur. Vit fáa sera góða móttøku allastaðni, har vit koma, og fólk eru altíð klár at liva við í okkara framførslum, sigur Michael Bundesen, sum í dag er einasti upprunalimurin í bólkinum.

– Hinvegin er tað eisini umráðandi fyri okkum sum spæla, at tað er stuttligt, og eftir øll hesi 37 árini er tað framvegis stuttligt. Vit royna altíð at hava eitt show afturat sjálvum tónleikinum, og tað er nakað, sum broytist frá ár til ár.

– Vit skifta eisini út í programminum hjá okkum, so vit spæla ymiskar sangir frá ári til ár. Sjálvsagt eru tað fleiri sangir, sum vit verða noyddir at spæla hvørja ferð, men aðrar sangir kunnu vit skifta ímillum, og tað gera vit.

– Tónleikurin hevur nógv at siga fyri okkum, og vit venja nógv, áðrenn vit fara á konsertferð. Eisini millum framførslurnar venja vit, so at okkara framførslur altíð kunnu verða góðar, sigur Michael Bundesen.

### Alt er loyvt

Og góðar eru tær framførslurnar. Hóast fleiri av løgunum eru fjórðingsøld gomul summi enntá eldri, so fáa hesi framvegis áhoyrararnar uppfrá. Hvalborg, Fed rock, Den røde tråd, McArine, Vuffeli-vov og enska umsetingin av hesum eru sjálvsagdir klassikarar, sum øll kennast við, og sum øll syngja við uppá, tá løgini ljóma um pallin.

Onkra tíð hava tekstirnir eisini havt atfinningar við sær. Ikki minst Vuffeli-Vov, sum fekk alla reyðsokkarørsluna í Danmark at reisast.

– Í niðurlagnum syngja vit »og kvinder for sjov«, og tað fall fleiri fyri bróstið.

Eisini vóru tað nógv, serliga innan kirkjuna, tá vit sungu at »Jesus blev født på anden sal«, men tað hevur altíð lagað seg eftir eina tíð. Í veruleikanum lá hann eisini í krubbuni á aðru hædd í Magasin, so tað var eingin stór lygn, sigur Bundesen við einum skálkabrosi.

Og teir sleppa eisini gott frá tí mesta. Frá at nevna Hitler og »heil« í fólkavognssanginum og frá at syngja um sexchikanu, slikkipinnar, heimabryggj, kannibalar, fíggjarsvik. Ja sjálvt frá at kopiera reglur úr tjóðsanginum inn í sínar sangir.. Einki er tabu og alt er loyvt, tá Shu-bi-dua fara á pallin við sínum framførslum

### Gleða seg til Føroyar

Hóast teir eisini eru átøkir fólkaogn í Føroyum, so er hetta bara næsta ferðin, at Shu-bi-dua koma á pall í Føroyum. Men Bundesen sjálvur leggur dent á, at hetta avgjørt ikki er orsakað av vantandi hugi til frá teirra síðu. Heldur tvørtur ímóti.

- Vit spæla fyri tað allarmesta í Danmark, so tað er deiligt at sleppa at royna okkurt annað. Tí gleða vit gleða okkum sera nógv til at koma til Føroya at spæla. Tað var fantastiskt at spæla í Føroyum seinast, so vit eru sera spentir til at koma aftur í ár.

– Tað er ikki so ofta, at vit ferðast uttan fyri Danmark við okkara tónleiki, so vit royna altíð at njóta tað, tá vit fara avstað. Vit hava fleiri ferðir spælt fyri dønum uttanlands, millum annað í Australia, USA, Italia og aðrastaðni, og tað hava altíð verið góðar ferðir.

– Seinast vit vóru í Føroyum, spældu vit í eini ítróttarhøll, men hesaferð spæla vit uttandura, og sum eg havi skilt, so verða tað fleiri ferðir so nógv fólk og lurta eftir okkum hesaferð.

– Vit fara at spæla somu sangir, sum vit vanliga spæla í Danmark, tá vit koma til Føroya. Seinast upplivdu vit, at føroyingar kendu allar okkara sangir. Tá vistu vit faktiskt ikki av, at føroyingar kendu okkara tónleik so væl, men tað gjørdu teir. Tað var sera hugaligt at uppliva, og vit ætla at geva føroyingum eina ordans konsert aftur hesaferð.

## Søgan í stuttum

Bólkurin varð stovnaður í 1973, tá Michael Bundesen og Michael Hardingar til stuttleikar spældu eina danska parodi av Jailhouse Rock. Lagið fekk heitið »Fed Rock«. Dagin eftir at lagið var at hoyra á P3, har teir báðir arbeiddu, fingu teir tilboð frá PolyGram, sum vildi geva lagið út á eini singlu.

Hetta var byrjanin til